# ítróttur

Nr. 237 • fríggjadagur • 8. desember 2000 • 74. árgangur • www.sosialurin.fo


H71-StÍF 24-30 (10-13)

# Johan bjarga›i strandingum



**StÍF hev›i stórar trupulleikar av einum til tí›ir væl leikandi H71-li›i, men í málverjanum høvdu teir so avgjørt besta leikara í dystinum**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Ta› var eins og ásko›ararnir uppi á Hálsi í Havn mikukvøldi› beinan vegin fingu eina ábending um, hvønn veg ta› fór at bera vi› dystinum millum H71 og StÍF.

Ikki vóru leiktir nógvir minuttir, fyrr enn Johan Danielsen í Strandamálinum hev›i framt fleiri framúr gó›ar bjargingar, og hesar høvdu vi› sær, at H71 als ikki fekk umsett leikliga b‡ti á vøllinum til ein tilsvarandi málmun.

Serliga hesa fyrstu løtuna tóktist ta›, sum um ta› kundi gera ta› sama, hvussu hoyvíkingar royndu. Av veinginum, bakkinum ella strikuni. Alt kundi gera ta› sama, tí Johan »superman«, sum tey rópa hann á Skála, var at kalla fyri hvørja fer›.

Verjan hjá StÍF var nevnliga alt anna› enn trygg fyrstu løtuna av dystinum. Serliga tóktist Hallur Danielsen at trívast væl vi› hesum, men fríspælingar hansara til vi›leikaranar vór›u misn‡ttar á nærum skammiligan hátt.

So vi› og vi› fingu strandingar tó betri skil á verjuna, men ta› tóktist tó greitt, at ongantí› sluppu rættiliga leysir av mótstø›uli›num. Fyrst og fremst orsaka› av kanónskjúttanum hjá H71, Halgir Dahl Olesen, men eisini tí hoyvíkingar ofta høvdu gott tak á verjupartinum, og har vi› fingu ste›ga vanliga kvika verjuspælinum hjá StÍF.

Fram móti endanum av fyrra hálvleiki fóru hoyvíkingar eisini út at mansverja rumenska Costin Dumitrescu, og ta› var sjónligt, at hetta órógva›i spæli› hjá strandingum.

Hinvegin er leikarahópurin solei›is hátta›ur, at ta› ofta kann vísa seg at geva bakslátt at fara út í eina mansverju. Talan er í nógvum førum um sera kvikar leikarar, og eitt nú dugdi Marius Joensen sera væl at gera sær dælt av eyka plássinum, sum ein mansverja av vi›leikara gevur.

Hoyvíkingar sleptu tó ongantí› takinum, men royndu alla tí›ina at halda sambandi vi› mótstø›uli›i› vi› líka, og satt at sgia, so eydna›ist heldur ikki strandingum at sleppa leysir. Ta einu løtuna í seinna hálvleiki kendu teir seg eisini noyddar at mansverja Halgir, tí ta› eydna›ist hoyvíkingunum somiki› væl at spæla hann upp til skot.

Tíggju mál gjørdi Halgir í dystinum, men hetta var tó ikki nóg miki› til at tryggja hoyvíkingunum naka› stig. Hinvegin skal leggjast afturat, at hev›i Johan Danielsen ikki sta›i› seg somiki› væl í málinum, so kundi máltali› hjá Halgiri lættliga veri› nógv størri, og so kundi søgan veri› ein heilt onnur.

Vi› sigrinum styrktu strandingar sær um stø›una á silvurplássinum, har teir enn eru staddir, men dysturin avdúka›i tó fleiri veikleikar fyri teirra vi›komandi.

Tann størsti av hesum var uttan iva verjuparturin, sum gjøgnumgangandi hekk illa saman, og vi›hvørt slettis ikki.

At John nú er aftur á li›num eigur at bøta um hendan partin av spælinum, eins og hann styrkir um álopi›, men mikukvøldi› tóktist ta› í øllum førum, sum um li›num tørvar meira.

Tankarnir fóru kanska at leita aftur til Sveinbjørn Poulsen, sum ikki longur hevur stundir at fer›ast aftur og fram til venjing hvønn dag. Evni hansara at binda verjuna saman og halda skil á vi›leikarum høvdu í øllum førum komi› væl vi› nú.

Álopsliga tykjast strandingar enn at vera væl fyri, og seinnu árini hevur ta› nærum hoyrt til undantøkini, at máltali› í dystunum hevur veri› ni›an fyri tríati.

Hetta hjálpir tó líti›, um mótstø›uli›i› samstundis sleppur at skjóta úti vi› f‡rati mál. Í roynd og veru kundi H71 væl nátt hesum tali, ti allir leikarar uttan ein hjá StÍF gjørdu líti› fyri at for›a hesum. Bert spell fyri hoyvíkingar, at hesin eini leikarin var málverjin.

Johan Danielsen prógva›i enn einafer›, at hann allar helst er besti málverji í landinum.

### Dysturin í tølum

Málskjúttar:
H71: Halgir Dahl Olesen 10(1), Hallur Danielsen 7(2), Rene Dahl Olesen 3, Annfinn N. Debess 2, Stefan Dorofte 2
StÍF: John Petersen 7(1), Marius Joensen 7, Costin Dumitrescu 6(4), Kristjan Petursson 4, Artur Johansen 3, Leivur Justinussen 1, Jon Rasmussen 1, Andre F. Danielsen 1
Brotskøst: H71 5, StÍF 6
Útvísingar: H71 4, StÍF 1
Dómarar úr Kyndli: Hanus Kúrberg og Hans Thomassen.

Tjaldur-Neistin 18-25 (8-13)

# Neistin vann í Runavík

**Í einsamalla kvinnudystinum mikukvøldi› eydna›ist Neistanum at toga› seg burtur frá teimum bá›um ni›astu li›unum**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

T‡dningurin av dystinum mikukvøldi› millum kvinnuli›ini hjá Tjaldri og Neistanum var stórur fyri bá›ar partar.

Tjaldur tykist at vera komi› naka› fyri seg, eftir at tær fyrr í ár hava fingi› tilgongd av Milica Ergic, men higartil er ta› bert komi› eittans stig burtur úr.

Hjá Neistanum ráddi eisini um at vinna. Li›i› hevur ikki víst somu styrki, sum vit á›ur hava sæ› Neistan havt, og eitt tap kundi ført vi› sær, at li›i› framyvir var› flokka› saman vi› ni›astu li›unum. Ein stø›a, sum avgjørt ikki hev›i hóva› sigursvanda kvinnuli›num.

### Avgjrdu um ste›gin

Solei›is kundi ta› á pappírinum bent á ein javnan dyst, og stóran part av fyrra hálvleiki fylgdust li›ini eisini. Seinastu 10 minutt-irnar eydna›ist tó Neistanum at skjóta nøkur mál á ra›, og so vendist ikki aftur hjá Tjaldri.

Neistin økti eisini enn meira um lei›sluna fyrstu løtuna av seinna hálvleiki, og at Tjaldur sí›ani fekk fatur aftur í rætta endanum broytti líti› og einki um úrsliti›.

### Nærkast

Vi› sigrinum slapp Neistin sær eitt sindur burtur frá ni›aru li›unum, og nú er eisini fari› at styttast upp til Kyndil og VB. Júst hesi bæ›i li›ini hittast í Vági í kvøld, og tá Neistin eisini hevur heimadystir móti júst hesum bá›um eftir í grundspælinum, kann væl vera, at tær bláu fara at toga seg enn longur upp á stigatalvuna.

### Dysturin í tølum

Málskjúttar:
Tjaldur: Beinta Joensen 5(1), Milica Ergic 5(3), Kristine Ellingsgaard 3, Turi› Lamhauge 3, Elinbjørg Hammer 1, Mona Langgaard 1
Neistin: Annika Thomsen 8(2), Susan Brockie 5, Mildrid Jaocbsen 4, Súna Mørk 3, Ata Høgnadóttir 2, Birita Wardum 2, Gunnvør Hofgaard 1
Brotskøst: Tjaldur 6, Neistin 2
Útvísingar: Tjaldur 1, Neistin 1
Dómarar úr StÍF: Justinus Justinussen og Poli Hansen



# Stutt frá sigri til tap

**Føroyski judoleikarin Búgvi Poulsen luttók herfyri í einari stórari altjó›a judokapping í Svøríki, nevnd Sweedish Judo Open**

JUDO
*Sofus Johannesen*

Tilsamans vóru yvir 200 leikarar úr 18 londum vi› í kappingini, og einans í Búgvasa vektbólki, -81 kg., vóru ikki færri enn 35 luttakarar.

### Fyrsti dystur

Búgvi kom eftir lutakasti› at kappast í tí fyrsta dystinum, og ta› var eisini ein sera sterkur mótstø›uma›ur, i› møtti honum á máttuni.

*Búgvi roynir seg vi› einum kasti.....*



Pär Evenäs úr Uppsala í Svøríki hevur luttiki› í mongum altjó›a kappingum, har hann hevur vunni› fleiri hei›ursmerkir, hóast ongi teirra hava veri› gull.

Hendan dagin kom Búgvi tó sera væl frá byrjanini, og heilt tí›liga í dystinum eydna›ist ta› Búgva at kasta svian vi› einum kasti, i› nevnist Tomoe Naga, men hann fekk onki fyri kasti›.

Dysturin helt fram vi› sera jøvnum leiki, til sviin einafer› herja›i á vi› einum kasti, sum tó ikki eydna›ist, men hann skifti tó beinan vegin og kasta›i Búgva vi› einum ø›rum kasti, sum hann fekk Ippon fyri, t.v.s. fult stigatal, og harvi› hev›i hann vunni› dystin.



*Men brøkpart av einum sekundi seinni er ta› finnin, i› kastar Búgva*

### Finnin

Búgvi fekk ein dyst afturat, og ta› var ímóti Vesa Rantala úr Finlandi, sum eisini er ein sterkur leikari.

Hesin dysturin hev›i eisini eina javna byrjan. Ikki langt inn í dystin satsa›i Búgvi vi› einum Ushi Mata til vinstru, men hann fekk ikki kasti at sita, og á›renn hann visti av, kasta›i finnin Búgva vi› einum mótkasti og vann dystin.

Harvi› var Búgvi sligin úr kappingini. Hóast hann ongan dyst vann, so stó› Búgvi seg bara væl í kappingini, sum var á sera høgum stø›i.

Næsta altjó›a kappingin hjá Búgva ver›ur Matsuma Cup, sum ver›ur í Danmark í februar komandi ár.

# GÍ styrkt um hópin

**Gøtumenn hava gjørt sáttmála vi› ein fyrrverandi polskan landsli›sleikara**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Úrslitaliga mundi ári› í fjør vera eitt hitt lakasta í langa tí› hjá gøtumonnum.

Í øllum tá tosa› ver›ur um landskappingina, har teir at kalla ongantí› vóru vi› í strí›num um hei›ursmerki. Í steypakappingini hepna›ist tó betri, og sigurin í hesari ber vi› sær, at gøtumenn aftur komandi ár fara at spæla europeiskan fótbólt.

### Styrkja um li›i›

Me›an fótbóltstosi› hevur gingi› dúgliga í hinum feløgunum, so hevur kanska ikki veri› so nógv at hoyrt til gøtumenn, men hetta merkir avgjørt ikki, at teir hava ligi› á latu sí›uni.

Petur Holm, nevndarlimur í GÍ, sigur vi› Sosialin, at GÍ hevur gjørt sáttmála vi› álopssinna›a polska mi›vallaran, Zdzislaw Janik.

Janik er 33 ára gamal, og spælir nú í næstbestu polsku rø›ini. Undan hesum hevur hann leikt í fremstu polsku deildini, hevur eisini veri› yrkisleikari umframt at hann smb. teimum uppl‡singum, sum GÍ hevur fingi›, eisini hevur veri› á pólverska landsli›num 13 fer›ir.

Petur Holm sigur, at teir vi› n‡ggja leikaranum hava fingi› ein leikara vi› nógvum royndum, og samstundis ein leikara, sum teir meta eigur at kunna teljast millum teir bestu her á landi.

GÍ hevur annars á›ur brent seg av at taka útlendskar fótbóltsleikarar til landi›, men ta› tykjast tey í Gøtu ikki at vera bangin um hesu fer›. Petur sigur, at tey hava rá›ført seg vi› fólk, sum hava gó›an kunnleika til bæ›i føroysk og pólsk vi›urskifti, og vóna tey, at hetta kann borga fyri, at talan er um ein veruligan styrk.

Um hópin annars sigur Petur, at hann stórt sæ› er óbroyttur í mun til undanfarin ár. Súni Olsen er farin av landinum, men annars meta tey talan vera um eina gó›a blanding av ungum og meira royndum leikarum.

Um nakar leikari afturat ver›ur innlima›ur í hópin, á›renn fari› ver›ur undir venjingarnar aftur, vil Petur einki siga um, men sum skilst á lagnum, so hava tey í Gøtu eins og a›rasta›ni eyguni opin fyri møguligari tilgongd.

## Fríggjadagsdystur í Vági

**Ein dystur í bestu kvinnudeildini ver›ur leiktur fríggjadagin, tá Kyndil vitjar VB. Annars eru fleiri dystir fluttir í mun til kappingarskipanina**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Orsaka› av landsdystum, steypakapping og ø›rum, hevur HSF veri› noytt at fremja fleiri broytingar í kappingini. Hetta ger, at kappingarskipanin ikki er eins eftirfarandi í øllum førum. Ni›anfyri ver›ur prenta› yvirlit yvir dystir, sum skulu leikast í desember mána›i

| Dagur | deild | dystur |
|---|---|---|
| Fríggjadag 8/12 | kvinnur | VB-Kyndil |
| Leygardag 9/12 | menn | H71-KÍF |
| Sunnudag 10/ 12 | kvinnur | Kyndil-VÍF |
| Sunnudag 10/12 | menn | Kyndil-VÍF |
| Sunnudag 10/12 | kvinnur | Stjørnan-Sóljan |
| Sunnudag 10/12 | kvinnur | VB-Tjaldur |
| Sunnudag 10/12 | menn | StÍF-Neistin |
| Mikudag 13/12 | menn | Neistin-Kyndil |
| Hósdag 14/12 | menn | VÍF-Tjaldur |
| Leygardag 16/12 | kvinnur | Sóljan-Neistin |
| Sunnudag 17/12 | menn | Neistin-StÍF |
| Sunnudag 17/12 | kvinnur | Tjaldur-Kyndil |
| Sunnudag 17/12 | menn | Tjaldur-Kyndil |
| Sunnudag 17/12 | kvinnur | VÍF-Stjørnan |
| Sunnudag 17/12 | menn | VÍF-KÍF |

Sum ta› framgongur av hesum, so ver›ur talan um ein dyst í bestu kvinnudeildini fríggjadagin. Kyndil, sum má sigast at hava eina sera strævna skrá í løtuni fer til Vágs, har uppgávan ver›ur at nærkast bronsuplássinum, sum VB hevur í løtuni.

VB eigur tó at roknast sum favorittur til dystin. Higartil í ár hava tær sta›i› seg heldur betri enn Kyndil, og øvugti dysturin í Havn herfyri enda›i eisini vi› sigri til VB.

### Stø›an 1. deild kvinnur

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 9 | 8 - 1 - 0 | 273 | 143 | 130 | 17 |
| 2 | Stjørnan | 9 | 8 - 1 - 0 | 257 | 193 | 64 | 17 |
| 3 | VB | 7 | 4 - 0 - 3 | 187 | 155 | 32 | 8 |
| 4 | Kyndil | 8 | 4 - 0 - 4 | 191 | 205 | -14 | 8 |
| 5 | Neistin | 9 | 3 - 0 - 6 | 185 | 213 | -28 | 6 |
| 6 | Sóljan | 9 | 1 - 1 - 7 | 179 | 237 | -58 | 3 |
| 7 | Tjaldur | 9 | 0 - 1 - 8 | 137 | 263 | -126 | 1 |

### Stø›an 1. deild menn

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 9 | 9 - 0 - 0 | 303 | 218 | 85 | 18 |
| 2 | StÍF | 11 | 7 - 1 - 3 | 331 | 287 | 44 | 15 |
| 3 | Kyndil | 9 | 4 - 2 - 3 | 259 | 229 | 30 | 10 |
| 4 | Neistin | 9 | 4 - 0 - 5 | 213 | 229 | -16 | 8 |
| 5 | H71 | 10 | 4 - 0 - 6 | 265 | 284 | -19 | 8 |
| 6 | Tjaldur | 10 | 3 - 0 - 7 | 228 | 300 | -72 | 6 |
| 7 | KÍF | 10 | 1 - 1 - 8 | 219 | 271 | -52 | 3 |

## Um kynsligan ágang




Á stjórnarfundi í farna mána›i samtykti ÍSF, at øll feløg innan felagsskapin skuldu fáa tilsent eitt eintak av faldaranum »Det uhørte overgreb«.

ÍSF hevur fingi› faldaran frá Dansk Idrætsforbund, og sn‡r hesum seg at byrja fyri kynsligan ágang móti børnum og ungum innan ítrótt.